# Seyðamaðurin á Sondum

Leggið nú tykkara høvur í blot,
meðan eg sigi frá søgum,
hvat ið skeddi í fornu tíð
úti í gomlum døgum.

*Tøkum lætt her í lundum,*
  *leikum vár' menn,*
  *latum vera dans, svein falla.*

2. Stígið nú so lættliga
og havið gott stig,
meðan eg kvøði um seyðamannin
og huldukonu við.

3. Tað skuldi vera í fornu tíð,
vilja tit mær trúgva,
norði á fjøllum við Húsagjógv,
har skuldi ein hulda búgva.

4. Ein onnur búði við Tormansgjógv,
systrar vóru tvá,
tær vóru klæddar í skarlak
líka niður á tá.

5. Tær vóru klæddsar í skarlak
líka niður á skó,
tann hjá henni við Húsagjógv
var reyður eins og blóð.

6. Seyðamaðurin á Sondum
er víða gitin í Norðum,
rætt sum reysti Rólant jall,
ið gitin var í forðum.

7. Hann røkti alla Sandavágssíðu
bæði við gleði og gavni,
hann var av mongum manni gitin,
men ikki nevndur á navni.

8. Tað var um ein árla morgun,
sólin skein so víða,
lysti honum seyðamanni
norð á fjøll at ríða.

9. Tað var um ein árla morgun,
sólin skein á vøll,
lysti honum seyðamanni
at ríða norð á fjøll.

10. Sólin skein so víða um vegir
yvir hvørjum tindi,
saðlaði hann hestin skjótt og brátt
í tí sama sinni.

11. Setti hann seg á hestin,
ið mundi tær gøtur kenna,
prygladi hann við hirðastavi,
so dúgliga mundi hann renna.

12. Tað var um ein árla morgun,
sólin skein so víða,
lysti henni huldukonu
at sóla stakkin fríða.

13. Hon legði hann á ta penu mark,
har sum sólin stóð á,
vakurt var at síggja,
fagur litur bar á.

14. Vakurt var at síggja,
fagur litur bar á,
perlurnar av reyðagulli
í bringuni mundu stá.

15. Seyðamaðurin á Sondum,
hann reið gjøgnum Fjallalíð,
tá sá hann tær perlurnar,
ið stakkinum glinsaðu í.

16. Seyðamaðurin á Sondum
hugsar so við sær:
Eg skal henda reyða kjóla
bera heim við mær.

17. Seyðamaðurin á Sondum
vendi hestinum tá
beint har ímóti,
sum stakkurin lá.

18. Hann ballaði hann so tilsaman
av tí reyða skarlak,
síðani legði hann hann
upp á hestsins bak.

19. Síðani legði han hann
upp á sín góða hest,
vendi so tilbaka heim
og reið, sum hann hundi best.

20. Huldukonan við eldin situr,
sær hon, sólin skínur:
"Eg skal út á hellu fara
at venda stakki mínum."

21. Tá ið hon kom á helluna,
tá var stakkurin burt,
skar hon saman tennir
og snerkti við skort.

22. Hon tók tá til at ganda
og tað við sterkum rúnum,
skimast runt við Fjallalíð
við sínum eygum brúnum.

23. Rópar hon yvir í Tormansgjógv
til systur sína tá:
"Seyðamaðurin á Sondum
skjól mær stakkin frá!

24. Systir, systir stíg í stórum,
kanst tú mannin ná!
Seyðamaðurin á Sondum
stjól mær stakkin frá!"

25. Svaraði aftur í Tormansgjógv
so huldisligani:
"Eg eri lamin í báðum beinum,
einki orki eg.

26. Gakk tú tað, ið tú kann best,
eg kann einki gera!
Eg eri lamin í báðum beinum,
kann meg illa nera."

27. Huldukonan við Húsagjógv
tók so til at ganga,
ginaði langt og gleivaði breitt,
ætlaði mann at fanga.

28. Seyðamaðurin á Sondum
ríður alt, hann orkar,
hoyrir hann, at huldukonan
aftan á sær snorkar.

29. Eingin fuglur var so skjótur,
hvørki á sjógv' ella landi,
sum tann hestur hjá seyðamanni
eftir Vatnsoyrarsandi.

30. Hesturin var móður,
hóast hann leyp av grið,
nakað so tyngdi hann
stakkurin við.

31. Hesturin var móður
og leyp for uttan ekka;
tá ið hann kom í Vatnsbrekku,
tá legði hann seg at drekka.

32. Tá ið hann hevði drukkið
eina so lítla stund,
tá kom hon í Vatnsoyrar
eftir tí grønu lund.

33. Hugsaði hann við sjálvum sær:
“Her er ikki at dvøla!
Tá kom hon at heimaru Gjógv
aftan á honum í hølum.

34. Seyðamaðurin á Sondum,
hann vendi hestinum frá:
“Hetta skal kallast
Sálarbótsá!”

35. Seyðamaðurin á Sondum,
hann vendi hestinum snart:
“Tungt er at ríða
mót brekkuni hart.”

36. Hesturin í helluna
fótin steig so fast,
at hóvsporið í helluni
enn á døgum sæst.

37. Vegurin er langur,
tað kann einhvør vita:
ríða norðan av Fjøllum
stóran mann at flyta.

38. Hesturin var reyður,
sum seyðamaðurin átti,
sveittin rann úr hvørjum hári,
var svartur sum ein pottur.

39. Tá ið hann kom at Føstuvarða,
var hann stívur í lørum;
tá kom hon og stunandi,
hon stóð upp fyri Vørðum.

40. Tá ið hann kom í Mosagerði,
nakað nærkaðist tá,
ikki meir enn eina
reipslongd frá.

41. Bannað veri huldukona,
enn hon dúgliga gekk,
tá ið hon kom á Giljarætt,
hon mannin aftur fekk.

42. Seyðamaðurin reið so skjótt,
at hann fekk ikki talað,
tá ið hann reið um ósan,
hon tók um hestsins hala.

43. Seyðamaðurin á Sondum,
hann um ósan reið,
huldukonan um halan fekk
og hann úr hestinum sleit.

44. Kastaði hann seg av hestinum
inn um kirkjugarð,
ólukkutíð at stakkurin
kom fastur har.

45. Kastaði hann seg av hestinum,
mangt var honum til mein,
ólukkutíð at stakkurin
kom fastur um ein stein.

46. “Pakka teg nú burtur,
títt satans ónda trøll!
Her er Gud og kirkjan,
trífoldigheitin øll!

47. Pakka teg nú burtur,
tað sigi eg for vist!
Her stendur hann uppmálaður
tann Harra Krist!”

48. Bardust tey um kirkjugarð,
so illa tað til gekk,
hann fekk aðra ermuna,
hon skerdan bulin fekk.

49. Messakulin í Sandavágskirkju,
sigst í hesum tátti,
var onnur erman av kjólanum,
sum huldukonan átti.

50. Messakulin í Sandavágskirkju,
sigst í hesum kvæði,
rárt er at finna
sovorðið skarlaksklæði.

51. Rárt er at finna
eitt sovorðið skarlak,
ein gullbroderaður krossur
stendur í hans bak.

Úr Kvæðabókini hjá Sverra Egholm, Tórshavn 1959. Miðvingarnir Jógvan í Lon (1821-52) og Jóannes hjá Mikkjali (1824-50) hava yrkt kvæðið eftir søgnini um seyðamannin á Sondum.

Uppskriftin er eftir Jakob Jakobsen (Ludvík á Steig kvað fyri honum) og Heina Haraldsen í Miðvági. jd.